# Eini 80 fólk á fundi um nýggja kirkju á Argjum



**NÝGGJ KIRKJA** Yvirhøvur tóku fólk væl undir við ætlanini at byggja nýggja kirkju við Sandá, sigur Bjartur Dalsgarð, formaður í kirkjuráðnum

Áki Bertholdsen

Tað vóru eini 80 fólk á borgarafundi á Argjum í mikukvøldið um ætlanina at byggja nýggja Argja kirkju á stykkinum ímillum Støðlagøtu og Sandá.

– Tað var gleðiligt, at tað var so nógv fólk á fundi, tí líkindini vóru einki serlig, sigur Bjartur Dalsgarð, formaður í kirkjuráðnum.

Hann sigur, at yvirhøvur lurtaðu fólk væl eftir og tóku undir við ætlanini.

Tað eru nú fimm ár síðani, at kirkjuráðið fór undir arbeiðið at byggja nýggja kirkju á Argjum.

Kirkjuráðið hevur útvegað sær grundstykki ímillum Støðlagøtu og Sandá og sjálvur heldur formaðurin at kirkjan kann ikki standa betri, enn akkúrat har.

Kjartan Dalsgarð sigur, at tað var býráðið, sum á sinni mælti til at byggja nýggju kirkjuna við Sandá.

Tað er ongin loyna, at mótmæli hava verið ímóti at byggja kirkjuna við Sandá.

Tað eru fólk, ið halda, at tað er skeivt at byggja á hesum stykkinum, sum er frílendi, har nógv fólk hava fragd av at brúka til gongu og tey stúra eisini fyri, at tað fer at taka nakað frá Sandá, sum er ein stór á í Havn.

Men formaðurin í Kirkjuráðnum leggur staðiliga dent á, at kirkjuráðið vil ikki birta upp undir nakra illstøðu og

## Tað er ótrygt at vera borgari í Havn

er vandi fyri, at Argir fer í tvíningar, verður ikki farið undir nýggja kirkju við Sandá.

– Hinvegin hava vit arbeitt fram ímóti, at kirkjan verður bygd, har býráðið skeyt upp at byggja hana.

Men Kjartan Dalsgarð sigur, at Kirkjuráðið hevur onki størri ynski enn at koma á tal við tey, ið hava mótmælt í eini roynd at finna eina semju, so at økið ikki verður spilt á nakran hátt.

– Heldur enn at skaða, er endamálið at prýða enn meira um alt tað vakra, sum fólk har í grannalafnum annars hava lagt úr hondum.

### Kapping

Formaðurin í Kirkjuráðnum sigur, at tá ið loyvi vónandi kemur um at byggja kirkjuna, verður bjóðað til arkitektakapping um kirkjuna, har nakrir arkitektar fáa høvi at bjóða seg fram.

Samstundis verður søkt um stuðul frá býráðnum og mentamálaráðnum og samstundis er ætlanin at biðja um staðbundnan kirkjuskatt til ætlanina.

Einastu bindingar, sum verða, er, at Kirkjan skal hava flagtekju fyri at vera í samsvari við tíðarandan í sambandi við umhvørviskrøv. Tað er eisini ætlanin, at ein partur av kirkjuni skal vera úr gróti fyri at heiðra niðursetumenninar á Argjum, sum vóru tiltiknir hegnismenn og grótlaðarar.

Tað er eisini ætlanin, at kirkjan skal kunna brúkast til tónleik og tí verður tað eisini eitt krav, at ljóðviðurskiftini í henni vera fyrstafloks.

– Tað hevði verið frálíkt, hevði tann nýggja kirkjan verðið eitt hús, tónleikarar og sangarar valfartaðu til við yndisligum tónleiki og øðrum tiltøkum, sum tó mugu liggja innanfyri karmarnar, sum ein kirkja rúmar, sigur Bjartur Dalsgarð.

Bjartur Dalsgarð vónar, at nýggj kirkja á Argjum kann vígast um fýra ár.

## 37 ÁR

Í ár eru tað 37 ár síðani, at kirkjan á Argjum varð vígd.
Men tíðir broytast og Bjartur Dalsgarð heldur, at hon nøktar ikki so væl tørvin longur.
Hann sigur, at í ein ávísan mun er húsið nakað slitið og farið við aldrinum.
– Tí er tørvur á nýmótansgerð og umvælingum fyri at fáa kirkjudám í húsið aftur og fyri at skapa tað sum eina kirkju, ið fólkið tekur til sín.
Hann sigur, at húsið er kortini ikki verri farið enn so, enn at tað við ávísum umvælinum og ábótum, er væl nýtiligt til onnur endamál.
Annars heldur hann, at bygningurin er ikki so prýðiligur, sum ein kirkja eigur at vera nú á døgum og hon hevur ikki tað kirkjuligu tign, sum ein kirkja eigur at hava.
– Hølini eru ótíðarhóskandi til ymsu endamálini og nýggj tiltøk í kirkjuni lata seg illa gera.
Samstundis er Argir vaksin rættuliga nógv og tað setir krøv til ein størri bygning.
– Ferðslan er økt á økinum og eir mongu bilarnir, sum standa parkeraðu, tá ið tiltak er í kirkjuni, elva til trupulleikar í ferðsluni, sigur Bjartur Dalsgarð.
Av øllum hesum orsøkum heldur Kirkjuráðið, at stundin er komin at byggja kirkjufólkinum á Argjum eina nýggja kirkju.

# Ósemja í býráðnum um nýggja kirkju á Argjum

**KIRKJUBYGGING** Tað er als ikki semja í býráðnum um, hvar tann nýggja kirkjan á Argjum skal byggjast og enn er óvist hvønn veg, tummulin fer at venda

Áki Bertholdsen

Enn er púra óvist um Kirkjuráðið á Argjum fær loyvi frá býráðnum at byggja nýggju kirkjuna á Argjum, har sum ætlanin er at byggja hana.

Kirkjuráðið hevur útvegað sær grundstykki til nýggja kirkju á stykkinum ímillum Støðlagøtu og Sandá, beint við Eikina, men tað er alt annað enn semja í býráðnum um hesa staðseting.

Tað eru nevniliga nakrir býráðslimir, sum heldur vilja finna okkurt annað stykki at seta nýggja kirkju á.

Bogi Andreasen, sum er formaður í byggi- og býarskipanarnevndini, sigur, at hann dugir ikki at siga um meiriluti er í býráðnum fyri at geva loyvi til at byggja nýggja kirkju akkurát har.

Men hann veit í øllum førum, at nakrir býráðslimir eru ímóti hesum, men um tað er nóg mikið til at forkoma ætlanin, veit hann ikki.

Sjálvur tekur Bogi Andreasen undir við, at nýggj Kirkja verður bygt á stykkinum við Sandá.

Hann heldur, at tað hevði klætt økinum har um vegir væl, at ein hábærslig kirkja stóð har.

### Tekur sína tíð

Hann sigur, at málið skal fyrt í byggi- og býarskipanarnevndini fyrst í februar mánað og tá fæst at vita, hvørja áskoðan teir ymsu nevndarlimirnir hava.

Men undir øllum umstøðum ivast hann ikki í, at onkur av nevndarlimunum fer at krevja, at málið verður lagt fyri alt býráðið til viðgerðar, áðrenn nakað verður gjørt.

Sostatt verður tað neyvan fyrrenn eftir býráðsfundin síðst í februar, at ein politisk avgerð fellur um argjafólk sleppa at byggja nýggja kirkju við Sandá, ella ikki.

Men skuldi undirtøka verið fyri tí, er framvegis langur vegur eftir, tí so skal byggisamtyktin broytast og tað tekur sína tíð.

Fyrst skulu broytingarnar gerast og samtykkjast í býráðnum. Síðani hava borgararnir eina kærufreist upp á tríggjar mánaðir.

Tá ið tann tíðin er farin, verður málið, saman við teimum kærum, sum uttan iva verða, sendar Innlendismálaráðnum, sum tekur endaliga støðu til broytingina.

Og tað er ikki fyrrenn, at Innlendismálaráðið hevur góðkent broytingina, at Kirkjuráðið á Argjum kann fara í holt við byggingina.

aki@sosialurin.fo